# Standa enn á berum

*Enn hevur ikki eydnast kriminal-løgregluni í Havn at fáa gongd á í málinum um vápnaða ránið. – Vit standa enn á berum, sigur Bergleif Brimvík*

SVEINUR TRÓNDARSON

Hóast nógv fólk arbeiðir við málinum um vápnaða ránið, sum varð framt móti handlinum hjá P. A. Restorff seinasta hóskvøld, so hevur tað ikki eydnast løgregluni at fáa stórvegis gongd á málið.

– Vit arbeiða við málinum alla tíðina, men enn eru vit ikki komnir nakran veg. Vit standa so at siga á berum, sigur Bergleif Brimvík, leiðari á kriminaldeildini í Havn.

Hann greiðir frá, at løgreglan var húsagongd í grannalagnum kring handilin hjá P. A. Restorff, men tað hevur ikki givið úrslit.

– Vit fáa upplýsingar alla tíðina, men enn hevur tað ikki verið nóg mikið til at seta ferð á arbeiði hjá okkum, sigur hann.

Tí heitir hann enn einaferð á fólk, um at seta seg í samband við løgregluna, um so er, at tey hava verið í økinum kring handilin hóskvøldið. Tað kann vera, at tey sita inni við upplýsingum, sum hava avgerandi týdning fyri løgregluna.

– Hóast vit hava nógv at arbeiða við í málinum, so høvdu vit verið serstakliga fegin, um vit fingu fleiri upplýsingar frá fólki, sum hava ferðast har um vegir. Tað kann vera, at tey hava sæð eitthvørt, sum kann vera júst tann upplýsing, sum vit bíða eftir, sigur Bergleif.

Ránið, sum bert er annað vápnaða ránið í Føroyum, varð framt hóskvøldið um tíggju tíðina, móti handlinum hjá P. A. Restorff. Handilin liggur í Sigmundargøtu, nær við Vágsbotn, og nógvir vegir eru við handilin. Tí hevur tað týdning, at øll, sum halda seg hava sæð eitthvørt, seta seg í samband við løgregluna.



*Kriminalløgreglan stendur enn á berum í málinum um vápnaða ránið í handlinum hjá P. A. Restorff seinasta hóskvøld.*

**Uppstillað mynd**

### Eftirlýsa kátum ungfólki

Kassadáman, sum sat í handlinum hetta kvøldið, hevur annars greitt løgregluni frá, at hon hoyrdi nøkur kát ungfólk beint eftir ránið.

– Eftir ljóðinum komu tey gangandi framvið VVS-horninum hjá Kalla, við Landavegin, og hon heldur, at talan var um ungfólk, uttan tó at kunna siga tað við vissu, sigur Bergleif.

– Hesum fólkum vilja vit fegin hoyra frá, tí tað er ikki óhugsandi, at tey sita inni við upplýsingum, sum kunnu geva okkum eitt skump tann rætta vegin, sigur Bergleif Brimvík.

Hann leggur afturat, at hesi fólk kunnu seta seg í samband við løgregluna í Havn á tlf. 311448.

TEY BESTU TILBOÐINI TIL KONFIRMANTARNAR

PHILIPS Stereoanlegg
MZ 7 - 2 x 50 w
• Hátalarar
• Radio
• CD
Vanl. prísur: 6.450,-
NÚ EINANS: 4690,00
Spar 1760,-
KONFIRMATIÓNS-TILBOÐ



Ericsson GSM fartelefon
T10
• 7 ringitónar
• Vibrator
• Dual Band
NÚ EINANS: 1990,00



KONFIRMATIÓNS-TILBOÐ
Motorola GSM fartelefon
AM3180
• Fax/data 9600 bps • SMS
NÚ EINANS: 945,00

Yamaha Western Guitar
F310
Alt hetta fylgir við:
• Taska • Reim
• Stemmufloyta
• Eyka streingir
• Streingjavindari
Vanl. prísur: 2490,-
NÚ EINANS: 1990,00
Spar 500,-



KONFIRMATIÓNS-TILBOÐ
JVC Boomblaster
RV-B99
• CD/Bandupptakari
• Radio
• Fjarstýring
• Ljóðið yvir øllum ljóðum
NÚ EINANS: 2950,00



ELDING
SMS - Tel 319697 • Saltangará - Tel 449697 • Klaksvík - Tel 479697

petur & petur • 320870 - Fyrivarni verður tikið fyri útseldum vørum og villum.

## ... og soleiðis sá hann út

Løgreglan leitar eftir einum manni, sum var ílatin kovboybuksur og ein myrkan jakka við hettu.

Hettuna hevði hann strammað væl um andlitið, so bara eyguni sóust og tí ber ikki til at siga, hvussu maðurin annars sær út.

Hann er umleið 170 sentimetrar til hæddar, er klæntrasligur og er mettur at vera um 30 árs aldur. Viðvíkjandi aldrinum er tað at leggja afturat, at tað kann merkja onkustaðni frá fyrst í tjúgunum til onkustaðni í tríatiárunum ...

**st**

## Trý hálkuóhapp

*Løgreglan í Klaksvík hevði eitt friðarligt vikuskiftið. Tvey smærri ferðsluóhapp var tað, sum tey høvdu at takast við um vikuskiftið*

SVEINUR TRÓNDARSON

Trý ferðsluóhapp vóru í Klaksvík um vikuskiftið. Eitt hendi tíðliga í vikuni meðan tvey hendu um vikuskiftið, sigur vakthavandi á støðini í Klaksvík.

Tað fyrsta ferðsluóhappið var á byrgingini við Haraldsund. Ein bilførari, sum var á veg til Haraldsund, misti tamarhaldi á bilinum, tá hann koyrdi eftir byrgingini, og hann rendi á ein stein á sunnaru síðu á byrgingini. Bilurin fekk so stóran skaða, at hann mátti flytast burtur av einum kranabili, greiður vakthavandi á støðini í Klaksvík frá.

Tey bæði óhappini, sum hendu um vikuskiftið vóru meira av ósketni, og eins í tí fyrsta førinum var bert talan um materiellan skaða.

Eitt hendi í svinginum við Depli. Ein bilur, sum var á veg niðan móti tunnlinum, kom í so langt út á breytina at hann nært við ein mótgangandi bil.

Hitt óhappið hendi mitt í býnum í Klaksvík og líktist tí fyrra. Tveir bilar bóru við hvønn annan tá annar teirra skuldi snara inn á ein annan veg.

Í ongum føri var talan um fólkaskaða.

## Ein tikin við kenning

Ein bilførari varð tikin fyri at koyra ávirkaður av rúsdrekka sunnunáttina, sigur løgreglan í Rúnavík.

Dansur var í høllini á Kambsdali leygarkvøldið, men hóast nógv fólk var komið saman, so gekk tað sera friðarliga fyri seg, sigur vakthavandi í Runavík.

– Tað var bara hesin eini, sum ikki kundi lata vera at fara í bilin, sigur vakthavandi.

**st**



# Landsstýrið eisini óhøviskt undir samráðingunum

JOHN JOHANNESSEN

Tað var ikki bert stjórnin, men eisini landsstýrið, ið fór harðliga fram undir fyrsta samráðingarfundinum um ríkisrættarligu støðuna í danska forsætismálaráðnum 17. mars.

Danka blaðið, Jyllands-Posten, veit at siga frá góðum keldum báðu megin samráðingarborðið, at føroyingar fóru ógvuliga harðliga fram á samráðingarfundinum. Hetta hevur Sosialurin eisini fingið váttað frá føroyskum keldum.

Eitt tað ógvuligasta álopið á donsku stjórnina frá føroyskari síðu var tá Høgni Hoydal kallaði danska búskaparmálaráðharran, Marianne Jelved, fyri ósiviliseraða, tá hon vísti einum føroyskum argumenti aftur. Saman við hørðum orðadrátti frammanundan, østi hetta báðar samráðingarpartarnar so mikið, at Anfinn Kallberg var noyddur at biðja um ein steðg í samráðingunum.

Og júst hesin steðgurin var orsøkin til, at danski forsætisráðharrin brádliga fór út og helt tíðindafund einsamallur, áðrenn samráðingarfundurin var liðugur. Fundurin millum føroysku umboðini mundi ikki blivið liðugur, og tá tey høvdu verið burt í meira enn tveir tímar, tók Poul Nyrup Rasmussen stig til at fara og halda tíðindafundin einsamallur.

Høgni Hoydal vísir pástandinum um, at hann hevur kallað Marianne Jelved fyri ósiviliseraða aftur. Somuleiðis vísir Høgni Hoydal á, at tað var danska stjórnin, ið fór óhøvisliga fram undir samráðingunum, og østi hetta føroyingar. Men kortini gjørdust føroyingar aldri eins harðrendir, sum danir.



*Danskir fjølmiðlar vilja vera við, at føroyingar eisini vóru óhøviskir undir samráðingunum*

**Mynd: Jens Kristian Vang**

# Samgongan ongar ætlanir á flogferðsluøkinum

*Tað eru somikið nógvir fyrimunir við einum nýggjum og betri flogvølli, at landsstýrið og samgongan eiga at umhugsa, um tað ikki er tað rættasta, sigur Heðin Mortensen m.a. í viðmerkingum til fyrispurning um flogvøll á Glyvursnesi*

ÓLAVUR Í BEITI



Heðin Mortensen hevur sett Finnboga Arge fyrispurning viðvíkjandi flogvølli á Glyvursnesi, og spyr Heðin Mortensen, hvørjar ætlanir landstýrið hevur um flogvøll á Glyvursnesi? Um ongar ætlanir eru, so ynskist svarað, hvør ætlan so er fyri framtíðar flúgving til og úr Føroyum? Hevur landsstýrið ætlanir um flogvøll á Glyvursnesi, so ynskist svarað, nær ætlanin er at fara undir arbeiðið? Hvørja støðu hevur landstýrið til, at t.d. Tórshavnar býráð fer undir at fyrireika og byggja flogvøll á Glyvursnesi? Og at enda spyr Heðin Mortensen, hvussu langt landsstýrið er komið við fyrireikingunum at skipa flúgving ímillum Tvøroyri og miðstaðarøkið?

### 40 ár síðan

Í viðmerkingunum, sigur Heðin Mortensen m.a., at fyrstu kanningarnar um ein framtíðar flogvøll í Føroyum vórðu gjørdar fyri 40 árum síðani. Tað varð gjørt, tí øll vóru samd um, at ein framtíðar flogvøllur ikki skuldi vera í Vágum. Tað var ikki møguligt, tí lendið var ikki til tað.

– Síðani er nógv tosað aftur og fram, og seinast í 80‘unum vóru ætlanir frammi um ein flogvøll á Glyvursnesi. Men tann ætlanin datt niðurfyri. Tað er eingin sum helst ivi um, at í framtíðini verður neyðugt við einum størri flogvølli enn honum, sum er í dag.

– Ein flogvøllur, sum er 1800 metrar, kann taka ímóti øllum meðalstórum flogførum, og verður hann so longdur, so kunnu flogførini vera enn størri. Og tað ber eisini til at gera ein flogvøll á Glyvursnesi fyri 130 mió. kr., um tilhoyrandi fasilitetir ikki vóru gjørdir í fyrsta umfari. Tað ber til at nýta høli í býnum til avgreiðslu o.a.

### Millumlenda í Føroyum

– Ein góður og tryggur flogvøllur er avgjørt neyðugur, bæði fyri føroyskt vinnulív, og ikki minst nú oljuvinnan stendur fyri durum. Kundu størri flogfør enn tey, sum vit í dag kenna til um okkara leiðir, lent á einum størri flogvølli, so vórðu avbera góðir møguleikar fyri at útflutt feskan fisk. Vit vita øll, at alivinnan er nógv ment, og at hon framvegis mennist.

– Haraftrat hevði ein størri flogvøllur gjørt tað møguligt hjá flogførum at millumlent í Føroyum, áðrenn tey fara víðari. Og so vísa kanningarnar eisini, at øll flogfør kundu lent og lætt við fullari last. Og tey flogfør, sum flúgva úr Føroyum, kundu flogið munandi longri, enn tey gera í dag, sigur Heðin Mortensen.

### Ov stuttur

– Nú eru ætlanir um at gera undirsjóvartunnil undir Vestmannasund fyri einar 300 mió. kr. Leggja vit øll hesi tølini saman, so er ikki tann stóri munurin á prísinum á einum flogvølli á Glyvursnesi og at útbyggja flogvøllin í Vágum og gera aðrar íløgur í tí sambandi.

– Stjórin í Atlantsflog hevur alment sagt, at neyðugt er við einum flogvølli aftrat, tí fólk fara ikki at góðtaka seinkingar vegna veður. Tí er neyðugt við einum flogvølli aftrat í Føroyum. Og stjórin í Atlantsflog segði samstundis, at flogvøllurin í Vágum er ikki nóg langur til smá jettflogfør, sum høvdu verið hóskandi ímillum Føroyar og fleiri onnur pláss her á leið.

– Tí er heldur eingin ivi um, at neyðugt er við einum flogvølli aftrat, og tann flogvøllurin má vera longri enn flogvøllurin í Vágum, og tað ber til á Glyvursnesi. Vónandi hevur landsstýrið hetta í huga, tá hugsað verður um íløgur í framtíðini, sigur Heðin Mortensen m.a. í viðmerkingunum.

# Síta fyri at sigla við Dúgvuni

JOHN JOHANNESSEN

Sunnudagin samtyktu bý- og bygdaráðsformenn í Suðuroynni saman við vinnulívsumboðum úr oynni at senda landsstýrinum skriv, har tey siga, at tey undir ongum umstøðum góðkenna, at Dúgvan verður sett at røkja siglingina til Suðuroyar meðan Smyril er í dokk.

Smyril skal nevniliga í dokk í seinasta lagi í juni mánaði, men SL hevur ikki havt ráð til at funnið eitt hóskandi skip at loysa Smyril av hetta tíðarskeið.

Nú suðuroyingar tískil á myndurleikarnir um at finna



neyðuga peningin til eitt avloysaraskip. Ásannað verður, at tað hevur týdning at viðlíkahalda Smyril, men meðan hann er burt, góðtaka suðuroyingar ikki at sigla við Dúgvuni.

Størstur í síni stødd – við største dieselmotori – til besta prísin

KIA
CARNIVAL
2.9 Dohc Turbo-Diesel
16 V, 126 HK, 5 hurðar

Familju - camping - firmabilur- og "mini-bussur"



Fæst eisini sum vøruvognur



EINANS 187.800,-

Multibilurin til einhvørja loysn
Dupult airbag, ABS, servostýring, sentrallás, startsperra, elrútar í framhurðunum, el-hitað og -stýrd síðuspegl, miðsetur, sum kunnu vendast og flytast aftur og fram við borðum, koyrisetrið kann setast í 8 ymiskar støður, rattið kann flytast upp og niður, nakkastuðlar, sum kunnu stillast og takast burtur, lesiljós framman, kúfangarar í sama liti sum bilurin, skinnarar á takinum v.m.
3 ára garanti/100.000 km. garanti



EINANS 225.800,-

Rætti bilurin til mong endamál.
–Pláss fyri 7 fólkum og hópin av viðføri. Fæst eisini við aut. gearum.

Sosialurin - 311820

D. B. Bilar J. Broncksgøta 15 • FO-110 Tórshavn Tlf. 310600